**Heimarøktin og Serforsorgin**
*Meginskrivstovan*

# Fakligur leiðari til Heimarøktina

**Innan Heimarøktina og Serforsorgina er starv sum fakligur leiðari fyri Heimarøktina leyst at søkja til setan 1. juni 2002 ella eftir nærri avtalu.**

**Heimarøktin veitir sjúkrarøkt og heimahjálp kring alt landið og er býtt upp í 6 øki. Skipanin umfatar 305 heiltíðarstørv, og verður tænasta veitt uml. 1100 heimabúgvandi brúkarum og 99 sambýlisbúgvum. Síðani 1996 hevur Heimarøktin arbeitt við at samskipa heimahjálpina og heimasjúkrarøktina. Vit eru komin væl áleiðis, men tørvur er á støðugari uppfylging og menning.**

**Ellis- og røktarheimsøkið verður fyrisiti av Heimarøktini og Serforsorgini. Økið umfatar 8 stovnar, við 230 heiltíðarstørvum og 257 røktarheimsplássum.**

Starvið er skipað sum sjálvstøðugt starv undir stjóranum fyri Heimarøktina og Serforsorgina. Fakligi leiðarin hevur ábyrgd av dagligu fyrisitingarligu-, fíggjarligu- og fakligu heildarleiðsluni av Heimarøktini, umframt eftirlits- og ráðgevingarskyldu mótvegis Elllis- og røktarheimsøkinum.

**Fakligi leiðarin skal:**
- røkja tað fyrisitingarligu leiðsluna.
- samskipa heimarøktina og tryggja eitt javnt tænastustøði.
- hava eftirlit við og ráðgeva sjálvsognarstovnunum á Ellis- og røktarheimsøkinum
- tryggja samstarv innanhýsis og við aðrar stovnar.
- menna og samskipa virksemi hjá Heimarøktini og Ellis- og røktarheimsøkinum
- reka mennandi starvsfólkapolitikk.
- veita starvsfólkum fakliga ráðgeving og tryggja fakliga menning.
- hava eftirlit og ábyrgd av játtaðari fíggjarætlan.

Harumframt skal leiðarin á Heimarøktini vera við til at fyrireika og koma við uppskotum til víðari menning av Heimarøktini og eldrarøktini sum heild.

**Vit vænta at fakligi leiðarin**
- evnar at hava eftirlit við og seta í verk fyriskipanir,
- hevur leiðsluroyndir á eldra- ella heilsuøkinum,
- evnar at yvirskoða fløktar samanhangir og at taka avgerðir,
- hevur vitan um og royndir í at stýra eini fíggjarætlan.

Umsøkjarin skal vera sjúkrasystir við víðari útbúgving og arbeiðsroyndum, íð gera tað sannlíkt, at viðkomandi kann fremja eina samanhangandi og málsøkna leiðslu av Heimarøktini.

**Setanar- og lønarviðurskifti.**
Talan er um starv við setanarstað í Heimarøktini og Serforsorgini við ábyrgd mótvegis stjóranum. Løn sambært sáttmála ímillum Fíggjarmálastýrið og Sjúkrasystrafelag Føroya

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Jákup Foldbo tlf. 304020

**Umsóknir:**
Skrivlig umsókn, við avriti av prógvum, viðmælum v.m. skulu sendast til:

**Heimarøktina og Serforsorgina**
Att. Jákup Foldbo, stjóri
Eirargarður 2, 2. hædd
FO-100 Tórshavn.

**Umsóknarfreist: 12. apríl 2002, kl. 12:00**



# Handilslærlingar
**til Skemmuna**



**– gerst lærlingur og fá nógvar fyrimunir!**

Spennandi smásøluútbúgving við egnum skúla

**Vit vænta av tær:**
At tú ert samstarvsfús/ur, ert sjálvstøðug/ur, hevur nógva orku og áræði, ert opin og ikki bangin fyri at siga tína meining.

**Tú verður skjótt til nakað – um tú sjálv/ur vilt!**
Tað er onki óvanligt, at ein næmingur í Skemmuni verður tilnevndur deildarleiðari stutt eftir lærutíðina, takkað verði teimum avbjóðingum hann fær. Tey allarflestu verða verandi í Skemmuni tá tey eru liðug at læra – og møguleikarnir eru nógvir. Í 23 ár hevur "Jysk Segnetøjslager" skapt meira enn 600 arbeiðspláss í Danmark og enn fleiri uttanlands. Og tað legst afturat ár um ár...

**Felags skúla-uppihald**
Sjálvt skúla-uppihaldið undir lærlingaútbúgvingini fer fram á okkara egna skúla í Norður-Jútlandi. Útbúgvingin fer fram á stats-viðurkendan hátt (øll almenn krøv viðv. útbúgvingini verða lokin), har tú, afturat teimum kravdu lærugreinunum, eisini fær nógv størri fakliga kunnan enn gjøgnum vanliga handilsútbúgving.
Gjøgnum skúla-uppihaldið býrt og etur tú á skúlanum saman við hinum lærlingunum. Hetta gevur eitt einastandandi samanhald – til langt eftir lærutíðina.

**Nær skalt tú byrja?**
Læruplássini skulu setast so skjótt sum møguligt. Umsóknin skal vera inni áðrenn 14. apríl.

**Ljóðar hetta spennandi?**
Send so eina skrivliga umsókn skjótast gjørligt til:

**SKEMMAN**
Staravegur 7 • FO-100 Tórshavn • Tel. 31 55 88



Visti tú ikki tað? Sosialurin

www.sosialurin.fo






Til Noregs í kristnum felagsskapi

**10. - 19. juni 2002**

Prísir úr 7.290,-

Mouritsen's Bussar MB

Tjarnardeild 8 · FO-100 Tórshavn · tel 31 44 64 / 32 21 21 · mour-bus@post.olivant.fo



# KYNDIL

**Lutaseðlasølan er endað og drigið er:**

1. vinningur nr. 1444
2. vinningur nr. 434
3. vinningur nr. 2504
4. vinningur nr. 1131

**Vinningarnir fáast við at ringja tlf 31 30 89**




# All That Rain á Kambsdali



## Annað páskakvøld fer All That Rain at spæla til dans í ítróttarhøllini á Kambsdali

**TÓNLEIKUR**
*Pop.fo*

Ein tann virknasti føroyski rockbólkurin seinnu árini fer at spæla til páskadans á Kambsdali annað páskakvøld, sum er komandi mánadag.

All That Rain hevur spælt av og á seinastu tíðina, men av tí at trummusláarin í bólkinum er í skúlaørindum niðri, hava teir ikki verið so aktivir í hesum árinum, sum teir annars vóru í fjør.

Bólkurin hvílir seg tó ikki bara, tí teir hava júst fingið nýggja og snøgga heimasíðu, har teir greiða frá sær sjálvum og tónleikinum hjá sær. Hendan heimasíðan er at finna á adressuni allthatrain.com

Meðan Henning Nicodemussen er í Danmark, hava hinir báðir limirnir í bólkinum verið á pallin undir navninum Slick. Jens Tummas Ness og Hans Ravnsfjall hava saman við Torkili Johannesen og Høgna Zachariasen spælt til dans í høvuðsstaðnum.

Annað páskakvøld verða teir tó aftur á palli sum All That Rain. Tá verður pallurin ítróttarhøllin á Kambsdali.

www.sosialurin.fo

**DUSINO**

**Vika 12 – 24. mars**
Vinnaratøl:
**1 - 3 - 5 - 6 - 7 - 9 - 10 - 14 - 15 - 16 - 17 - 20**

| | |
|---|---|
| 12 í sama felti: | **Eingin vinnari** |
| 11 í sama felti: | **2.974,- kr.** |
| 10 í sama felti: | **110,- kr.** |
| 9 í sama felti: | **25,- kr.** |

Sosialurin tekur onga ábyrgd av møguligum villum

**LOTTO**

**Vika 12 – 23. mars**
Vinnaratøl: **10 - 11 - 16 - 22 - 24 - 31 - 33**

Eykatøl: **04 - 19**

| | |
|---|---|
| 7 vinnaratøl: | **Eingin vinnari** |
| 6 vinnarat.+ eykatal: | **76.546,- kr.** |
| 6 vinnaratøl | **4.955,- kr.** |
| 5 vinnaratøl: | **164,- kr.** |
| 4 vinnaratøl: | **44,- kr.** |

Sosialurin tekur onga ábyrgd av møguligum villum



**Vika 12 – 23. mars**
Jokaratal:
**4 - 8 - 1 - 1 - 1 - 3 - 7**

| | |
|---|---|
| Øll 7 røtt: | **Eingin vinnari** |
| 6 aftastu røtt: | **320.646,- kr.** |
| 5 aftastu røtt: | **21.404,- kr.** |
| 4 aftastu røtt: | **1.984,- kr.** |
| 3 aftastu røtt: | **242,- kr.** |
| 2 aftastu røtt: | **50,- kr.** |

Sosialurin tekur onga ábyrgd av møguligum villum

## VALUTAKURSIR

| | | 26.03.02 | Ultimo februar |
|---|---|---|---|
| USA | **Dollarar** | 850,8100 | 855,9800 |
| Bretland | **Pund** | 1211,0600 | 1219,8900 |
| Svøríki | **Króna** | 82,5800 | 81,9800 |
| Noreg | **Króna** | 96,4300 | 96,0800 |
| Sveits | **Frankur** | 508,6600 | 503,4600 |
| Ísland | **Króna** | 8,4600 | 8,4900 |
| Kanada | **Dollari** | 533,7500 | 533,1500 |
| Japan | **Yen** | 6,3906 | 6,3856 |
| | **Evra** | 743,3500 | 743,1600 |

FØROYA SPARIKASSI

# KROSSORÐ



**Vinnari:**

*G. Joensen*
*Bøkjarabrekka 14*
*100 Tórshavn*

## Loysnin frá seinastu viku
## Loysunarorðið: URTAPOTTUR



## Hvønn fríggjadag

er krossorðagáta í blaðnum. Drigið verður millum røttu innsendu loysnirnar. Vinningurin er ein bók frá Bókadeild Føroya Lærarafelags ella Føroya Skúlabókagrunni. (Krossa av á listanum høgrumegin, hvørja tú best kundi hugsað tær).

Fyri at verða við í dráttinum um vinningin, má loysunarorðið vera okkum í hendi í seinasta lagi hósdagin. Vinnarin verður saman við loystu gátuni kunngjørdur í blaðnum næsta fríggjadagin.

Sendið loysunarorðið til: Sosialurin, Box 76, 110 Tórshavn – og viðmerkið »Krossorðagáta nr. …« á bjálvan.

**296**

**Loysunarorðið:** ……………………………………

Navn: ……………………………………………

Bústaður: ………………………………………

Bygd/býur: ………………………………………

***Lesið føroyskt – hugsið føroyskt!***

Frá ***BÓKADEILD FØROYA LÆRARAFELAGS:***
- ❑ **Úti á leysum oyggjum** - *Marianna Debes Dahl*
- ❑ **Matur í myndum** - *Sigrid Dalsgaard/ Beinta Johannesen*
- ❑ **Í skýmingini** - *Sofía Petersen/Elinborg Lützen*
- ❑ **Meistarin og teir fýra skrivararnir** - *Ulf Nilsson/Karl N. Hansen týddi*

Frá ***FØROYA SKÚLABÓKAGRUNNI:***
- ❑ **Mállæra** - *Paulivar Andreasen/Árni Dahl*
- ❑ **Rura** - *Þóra Þóroddsdóttir*
- ❑ **Føroya jarðfrøði** - *Jóannes Rasmussen*
- ❑ **Íslandsklokkan** - *Halldór Laxness*
- ❑ **Fólk og mentan** - *Jóan Pauli Joensen*

***Bøkur og annað tilfar – bæði innan og uttan skúlagátt***